# Ein ólukka fyri vísindaligt arbeiði

**- At brúka 130-140 milliónir upp á eina granskarapark, kann verða ein ólukka fyri vísindaligt arbeiði í Føroyum, heldur Magnus Danielsen, professari á Fróðskaparsetrinum**



*- Veruleikin er, at politiski viljin at økja um granskingina í Føroyum er á einum út av lagi lágum støði, sigur Magnus Danielsen, professari á Fróðskaparsetrinu. Tí stúrir hann fyri, at viljinj til at styrkja og menna granskingina fer at falla til næstan eitt nullpunkt, fara vit nú at brúka 130-140 milliónir upp á eina granskarapark*

GRANSKARAPARK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sum støðan í samfelagnum er nú, er tað skeivt at brúka 135 milliónir upp á at byggja eina nýggja granskarapark í Føroyum.

Tað heldur Magnus Danielsen, professari á Fróðskaparsetrinum.

Sostatt mælir hann løgtinginum frá at taka undir við ætlanini at byggja eina nýggja granskarapark.

Løgtingið viðgerð í løtuni eitt uppskot um at byggja eina granskarapark, sum er mett at kosta 75 milliónir krónur.

- Hetta er peningur til ein bygning og ikki til vísindaligt arbeiði, staðfestir Magnus Danielsen.

Men harafturat er ætlanin at brúka útvið 60 milliónir krónur at reka parkina fyri tey næstu fýra árini. Sostatt fer granskaraparkin at kosta skattgjaldaranum tilsamans einar 135 milliónir krónur.

## Ein koddi

Magnus Danielsen sigur, at fara politikararnir at brúka eina so stóra upphædd upp á ein bygning, er vandi fyri, at hetta verður ein koddi so at tað fer at vera torført eisini at fáa teir at játta pening til vísindaligt arbeiði.

Magnus Danielsen heldur, at hetta er ein veruligur vansi, serliga tá ið hugsað verður um, hvussu torført tað higartil hevur verið at fáa politikararnar at játta pening til vísindaligt arbeiði.

- Brúka teir 135 milliónir upp á eina granskarapark er vandi fyri at politiskur vilji ikki eisini verður til at játta meiri pening til veruligt granskingarvirksemi.

Hann sigur, at upphæddin til granskaraparkina skal samberast við, at vit annars ikki brúka meiri enn 84 milliónir til gransking í Føroyum um árið - og tá er talan um bæði privata og almenna figging.

- Við tí í huga, at politiski viljin at økja um granskingina í Føroyum er á einum út av lagi lágum støði, kunnu hesar 130-140 milliónirnar til eina granskarapark fáa politiska viljan til íløgur í veruliga mennandi gransking aftrat, til at falla til næstan eitt nullpunkt, sigur hann.

Professarin heldur, at tað hevði verið nógv betri at brúkt peningin til at styrkt teir vísindaligu stovnarnir, vit hava.

- Varð peningurin brúktur til beinleiðis at fremja gransking á teimum stovnunum vit hava, høvdu vit fingið nógv skjótari úrslit, enn vit fáa við eini granskarapark.

## Niðurpínt

Men er tað ikki bara gott, at tað almenna ger eitt munagott átak fyri at bøta um karmarnar fyri granskingina?

- Tað skuldu teir gjørt við at styrkt teir granskingarstovnarnir, sum eru, fyrst og fremst Fróðskaparsetrið, sum er universitetið í Føroyum, men eisini aðrar stovnar.

- Tað, sum føroysk gransking líður so illa undir, er, at vit hava eitt niðurpínt Fróðskaparsetur og tað er støðan í Føroyum, hóast londini rundanum okkum júst leggja stóran dent á at menna universitetsgransking.

- Sjálvandi er tað av alstórum týdningi at vit menna gransking, men trupulleikin við granskaraparkini er, at peningurin verður brúktur skeivt eftir mínum tykki, tí hann var betri farin, var hann brúktur til at menna Fróðskaparsetrið og aðrar vísindaligar stovnar, sum fáast við gransking, sigur Magnus Danielsen.

Les eisini síðu 6.

# Á wc í býnum alt samdøgrið

**Í Havn er einki alment wc opið um kvøldið og náttina. Hetta skapar trupulleiki hjá fólki, sum ikki eiga trupulleikan. Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn sigur, at arbeitt verður við at nøkta tørvin á almennum nátthúsum til várs**

UMHVØRVI
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

**Tórshavn:** Tórshavnar Kommuna hevur gjørt stór og gagnlig tiltøk fyri at kunna børnini og tey ungu um umhvørvismál. Undir herrópinum: "Lort í Býin" hava okkara yngstu samfelagsborgarar lært at fara betur um umhvørvið, og at halda býin reinan og fríðan. Slagsangir eru skrivaðir í hesum sambandi, og stór tiltøk eru eisini framd fyri at fáa boðskapin út um, at ein eigur ikki at koma "Lort í býin". Men nú vísir tað seg, at tað eru tey, sum ikki ynska at koma í hesa støðu, men av givnum orsøkum enda í henni! Havnin manglar nakað, sum aðrir býir í Norðanlondum hava. Í øðrum støðum ber til at nøkta ein ávísan neyðturviligan tørv við mynttoilettum. Men tey, sum fara ein túr í býin í Tórshavnar býi mugu hyggja langt eftir mynttoiletunum. Tá fólk soleiðis koma illa fyri, endar tað við, at tey banka á dyrnar hjá teimum, sum einki hava við henda trupulleika at gera!

## Hava ikki lov

Hjá taxastøðini BIL á, sum húsast á Farstøðini er støðan greið. Eftir at Farstøðin er stongd, hava tey ikki loyvi at lova nøkrum fólki inn, sum ikki er í starvi hjá P/F BIL. Har hendir tað javnan, at avbygdafólk og útlendingar banka uppá, tí Havnin ikki hevur mynttoilettir, eins og tey hava tað í norðurlendsku býunum, sum Havnin plagar at samanbera seg við. Men hjá teimum í BIL er støðan einfald. Leigumálið við Strandferðsluna tilskilar, at eingin skal inn um dyrnar, sum ikki er í starvi har. Kortini verða tey í heilum órógvað. Og tað er ein støða, sum tey ikki kunnu liva við. Tí tey mugu halda seg til leigusáttmálan.

## Eru eftirbátar

Heðin Mortensen, borgarstjóri viðgongur, at Havnin er ein eftirbátur á júst hesum økinum. Og at høvuðsstaðurin ikki kann bjóða seg fram, sum ferðamannabý við tí manglandi útboðnum av almennum nátthúsum, sum er nú. Heðin Mortensen metir, at idealið hevði verið at fingið somu skipan sum Reykjavík.

Í miðbýnum í Reykjavík eru nakrir diskretir kuplar, sum virka, sum sjálvreinsandi nátthús. Borgarstjórin metir, at hesir kuplar høvdu verið ein hóskandi loysn til Havnina. Í Reykjavík betalir ein 50 íslendskar kr. (uml. 5 kr) fyri at sleppa inn í ein slíkan kupil.

Á Rhodos sá borgarstjórin eisini eina líknandi skipan, sum fungeraði sera væl. Býráðið hevur eitt alment WC í Mylnugøtu. Har starvast tvey fólk. Men vanligt er, um ikki eitt serligt tiltak er á skránni, at stongt verður kl. 8 um kvøldið. Tvey onnur almenn WC eru. Í Kiosk Steinatúni og á Farsstøðini, tá Strandferðslan hevur opið. Men eisini har verður stongt lutfalsliga tíðliga um kvøldið. Men gongur tað, sum borgarstjórin ætlar, verður Havnin ikki eftirbátur á hesum økinum.

Á vári 2008 kunnu avbygdarfólk og útlendingar koma til Havnar, og koma væl í býin.